# Skifta graslíki út

**Í góðveðrinum mánakvøldið fóru menn í gongd við at taka gamla graslíki av niðara vølli í Gundadali**

VALLARRØKT

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*




*Seks umboð fyri HB stríðast her við at taka gamla graslíkið av niðara vølli. Frá vinstru Birgir Enghamar, Heine Fernandez, Jógvan Páll Lassen, Sólbjørn Thomsen, Bjarni Kyster og Steinfinn Mittelstein.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Hesi seinnu árini er graslíkið á fleiri av eldru graslíkisvallunum kring landið skift út, og nú er túrurin so komin til niðara vøll í Gundadali.

### Hevur tænt fyri seg

Niðari vøllur í Gundadali í Havn, soleiðis sum vit kenna hann í dag, er 13 ára gamal. Gamli niðari vøllur, sum var grúsvøllur, lá eystur-vestur, men tá graslíkisvøllur bleiv gjørdur í 1992, bleiv vøllur samstundis vendur, soleiðis at hann nú liggur suður-norð.

Hesi 13 ár, ið graslíki hevur verið á niðara vølli, er tað ongantíð skift út, og tað er einki dulsmál, at tað hevur trongt til í fleiri ár at blíva skift út. Nú er hetta arbeiði so farið í gongd, og væntandi verður tað liðugt beint eftir ólavsøku. Nýggja graslíkið verður tað sonevnda triðja ættarliðs-graslíki. Komandi ár verður graslíkið á ovara vølli eisini skift út.

Heðin Mortensen, borgarstjóri, sigur, at graslíki, sum verður tikið av niðara vølli, fer heldur ikki til spillis.

- Gamla graslíkið verður tikið av undir eftirliti av serkønum fólki, og síðani verður tað skorið sundur á ein slíkan hátt, at tað kann nýtast aftur aðrastaðnis í býnum. Vit ætla at brúka graslíkið á fleiri spælipláss-um kring býin, og væntandi røkkur graslíkið av niðara vølli til okkurt um 15 spælipláss í Havn, sigur Heðin Mortensen.

Borgarstjórin sigur, at á fundi í næstum fer mentamálanevndin væntandi at játta pening til arbeiði at gera øki á spælipláss-um klárt til graslíki og til at leggja graslíkið á.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi, seinnapartin lot av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 14 og 17 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Lot til andøvsgul av suðri, seinnapartin upp í stívt andøvsgul . Sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 13 og 16 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og suðri og stundum sirm, eisini mjørki í støðum. Hitin millum 11 og 15 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 6 |
| Nuuk | 7 |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 6 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | -- |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 17 |
| London | 20 |
| Tromsø | 20 |
| Bergen | 17 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 22 |
| Keypmannah. | 21 |
| Helsinki | 21 |
| Moskva | 19 |
| Berlin | 20 |
| Warzawa | 23 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 16 |
| Paris | 24 |
| Madrid | 33 |
| Róm | 31 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 29 |
| Malta | 28 |
| Tunis | 30 |
| Beijing | 35 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 16 |
| New York | 25 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 29 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 20 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 990 hPa. yvir Íslandi grynnist. Eitt annað lágtrýst, 996 hPa. yvir Norðsjónum fer í útnyrðing norðan




**Í dag:**
Lágtrýstið eystan fyri Ísland fer norðureftir. Lágtrýstið eystan fyri Hvarvið fer eystureftir – suður um Føroyar.




## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 2/7 kl. 06⁰⁰– 3/7. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,5°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 13,0 mm – mált frá 2/6 kl. 06⁰⁰– 3/7 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juli: 20,0 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

5. juli — Jørðin longst frá sólini
6. juli — Tendring
8. juli — Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6. Juli | 07.31 | 19.56 | 06.31 | 18.56 | 06.46 | 19.11 | 09.31 | 21.56 | 10.31 | 22.56 | 05.46 | 18.11 | 04.46 | 17.11 | 07.46 | 20.11 | 08.46 | 21.11 | 07.16 | 19.41 | 08.31 | 20.56 |
| 7. Juli | 08.20 | 20.45 | 07.20 | 19.45 | 07.35 | 20.00 | 10.20 | 22.45 | 11.20 | 23.45 | 06.35 | 19.00 | 05.35 | 18.00 | 08.35 | 21.00 | 09.35 | 22.00 | 08.05 | 20.30 | 09.20 | 21.45 |
| 8. Juli | 09.07 | 21.30 | 08.07 | 20.30 | 08.22 | 20.45 | 11.07 | 23.30 | - | 12.07 | 07.22 | 19.45 | 06.22 | 18.45 | 09.22 | 21.45 | 10.22 | 22.45 | 08.52 | 21.15 | 10.07 | 22.30 |
| 9. Juli | 09.49 | 22.09 | 08.49 | 21.09 | 09.04 | 21.24 | 11.49 | - | 00.30 | 12.49 | 08.04 | 20.24 | 07.04 | 19.24 | 10.04 | 22.24 | 11.04 | 23.24 | 09.34 | 21.54 | 10.49 | 23.09 |
| 10. Juli | 10.27 | 22.46 | 09.27 | 21.46 | 09.42 | 22.01 | 00.09 | 12.27 | 01.09 | 13.27 | 08.42 | 21.01 | 07.42 | 20.01 | 10.42 | 23.01 | 11.42 | - | 10.12 | 22.31 | 11.27 | 23.46 |

Sosialurin
5 707265 100036 >